


## Fuglsang skrivaði søgu

Danski súkklarin Jacob Fuglsang, skrivaði søgu, tá hann vann 20. útgávuna av súkklukappingini Post Danmark rundt. Ungi danski súkklarin, sum er partur av danska súkkluliðnum, Team Saxo Bank, hevur vunnið hesa kapping seinastu trý árini, og tað hevur ongin annar megnað áður. Sunnudagin varð síðsti teinurin í Post Danmark rundt súkklaður. Undan síðsta teininum vóru 27 sekund millum Jacob Fuglsang og nærmasta kappingarneytan, Svein Tuft. Hóast 27 sekund ikki ljóðar av so nógvum, so hevði Fuglsang sera góð kort á hondini innan síðsta teinin. Tað ráddi um hjá Jacob Fuglsang og hinum í Team Saxo Bank serliga at halda eitt vakið eygað við naskasta kappingarneytan í oddastríðnum,kanadiumanninum Svein Tuft. Hetta eydnaðist til fullnar, so at Jacob Fuglsang kom á mál saman við eitt nú Sveit Tuft. Hetta hevði við sær at Fuglsang vann kappingina, 27 sekund framman fyri Svein Tuft, sum gjørdist nummar tvey. Sostatt vann Jacob Fuglsang triðja árið á rað donsku súkklukappingina Post Danmark rundt, og skrivaði harvið søgu.

# KÍ BÍTUR FRÁ SÆR Í LITAVA

**Í hesum døgum eru klaksvíkskvinnur við í bólkaspælinum í Champions League, sum verður spælt í Litava. Hini liðini í bólkinum eru Everton, Gintra Universitetas og ZFK Borec. Hetta er 10. ferðin at KÍ luttekur í evropiskum fótbólti, og úrslitini vísa, at klaksvíkskvinnur ikki smæðist burtur millum hini meistaraliðini**

Ólavur Øre Hansen

KÍ kvinnur eru við í bólkaspælinum fyri meistaralið á 10. sinni, og úrslitini vísa at klaksvíkskvinnur gott kunnu geva hinum liðunum skarpan gang.

-Higartil eru vit vælnøgd við úrtøkuna. Vit taptu 6-0 í fyrsta dystinum. Mótstøðuliðið var enska meistaraliðið, Everton, sum avgjørt er sterkasta liðið í bólkinum. Leygardagin var so næsti dysturin á skánni, og tá spældu vit málleysan javnleik ímóti Gintra Universitetas úr Litava, sigur hjálparvenjarin hjá KÍ, Rasmus Jacobsen.

Triði og síðsti dysturin í bólkaspælinum verður týsdagin, tá KÍ skal spæla ímóti makedónska meistaraliðnum, ZFK Borec, og Rasmus metir at uppgávan ikki er ræðandi.

-Vit spældu ímóti einum øðrum makedónsku liði í fjør, og tá vunnu vit 4-2, so uppgávan er ikki ómøgulig. Men tó er neyðugt hjá okkum ikki at undirmeta makedónska liðið, sigur Rasmus Jacobsen.

Mennandi fyri føroyska kvinnufótbólt

Seinastu 10 árini hevur Kí verið einaráðandi í landskappingini, og tí metir Rasmus, at tað er neyðugt at luttaka í evropiskum fótbólti.

-Ja tað er avgjørt mennandi fyri KÍ at luttaka. Tað er meira so sum so við mótstøðu í føroysku landskappingini, og tí er alneyðugt at luttaka í evropiskari kapping, fyri at KÍ, og føroyskur kvinnufótbóltur sum heild, kann mennast, sigur Rasmus í stuttari viðmerking til Sosialin.



## Hendrik vónar og væntar at fáa spælitíð

**Hendrik Rubeksen fekk landsliðsboð frá Brian Kerr um vikuskiftið**

Uni Holm Johannsen

Hann hevur røkt uppgávuna sum vinstri bakkur hjá HB í hesum kappingarárinum, hóast hann undanfarnu árini hevur gjørt vart við seg sum framherji.

Hendrik Rubeksen væntar, at hann fær ein leiklut í landsdystinum móti Estlandi mikukvøldið. Tað er ikki vist, um Einar Hansen, sum vanliga spælir vinstri bakkur, fer at spæla við fullari megi. Hann er smáskaddur.

- Eg vænti, at eg fái ein lítlan leiklut. Eg havi staðið meg væl í hesum kappingarárinum, men úttøkan kemur óvart á meg, sigur Hendrik Rubeksen.

# Fýra stórtap í fýra dystum

**Málúrtøkan hjá føroyska U-17 landsliðnum gjørdist 1-28 aftaná fýra dystir í NM-kappingini**

Heri Simonsen

Eisini finsku U-17 dreingirnir vóru eirindaleysir, tá teir spældu ímóti føroyska U-17 landsliðnum í plasseringsdystinum um sjeynda/áttanda plássið.

Finnland vann heili 8-0, aftaná hálvleiksstøðana 4-0. Sigast má, at sjáldan hevur úrtøkan verið so soltin hjá einum føroyskum U-17 landsliði til eitt norðurlandameistaraskap fyri U-17 landslið.

Føroysku U-17 dreingirnir taptu fyrst 0-9 ímóti Svøríki, síðani 0-6 ímóti Noregi, og so kom frægasta úrslitið ímóti Skotlandi, har føroysku U-17 dreingirnir taptu 1-5. Tá kom føroyska liðið á odda 1-0 við einum avbera vøkrum málið, sum Ari M. Danielsen skeyt úr 30 metra fjarstøðu uttan møguleika hjá Celtic málverjanum at bjarga, men tá liðini fóru til hálvleiks var Skotland á odda 2-1.

Annar av venjarunum hjá U-17 landsliðnum, Pól F. Joensen sigur, at liðið stóð seg væl tann fyrsta hálva tíman ímóti Noregi og Svøríki, men tá liðini fyrst skora ímóti okkara liði, so tykist tað sum ein klappur fer fyri eyguni hjá føroysku dreingunum. Í seinna hálvleiki gekk væl fyrsta korterið, men so endaði aftur galið, tá norðmenn og svenskarar fingu mál.

Um 0-8 tapið ímóti Finnlandi sigur Pól F. Joensen, at føroyska liðið brúkti ov nógva orku til at fáa eitt brúkiligt úrslit ímóti Skotlandi, og dreingirnir tí vóru deyðatroyttir, tá teir møttu finska liðnum.

- Tað fysiska og kondisjónsmessiga haltar úti í feløgunum. Tann føroyska kappingin er alt ov veik til, at vit kunnu takast við so krútsterk lið, sigur ein sera bersøgin Pól F. Joensen.

heris@sosialurin.fo

